Sosialurin

# VARPIÐ



Canal+Film1 • Mánadagin kl. 19.00

## Første gang jeg fyldte 20

16 ára gamla Hanna býr í einum forstaðið til París í 60'unum. Hon hevur ikki nógvar felagsnevnarar við familju síni, og heldur ikki í skúlanum er hon serliga væl lýdd. Men tá hon, sum tann einasta gentan, sleppur við í jazzbandið á skúlanum, sær hon brádliga sín møguleika.

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks



DR1 • Sunnudagin kl. 21.30

## Motorcykeldagbog – på tur med Che Guevara

Filmatiseringin av roadmoviebókini hjá Walter Salles hevur Gael Barcia Bernal í høvuðsleiklutinum sum tann ungi Che Guevara. Saman við vinmanninum Alberto fer hann í 1952 á ein 12.000 kilometra langa motorsúkkluferð gjøgnum Suðuramerika.



DR2 • Mánadagin kl. 19.50

## Den hemmelige smerte

Dramatiskar hendingar høvdu við sær, at Kate Kendel sum átta ára gomul skuldi búgva hjá ymsum missioner-foreldrum í Sierra Leone og í Skandinavia. Men tá hon sum 16 ára gomul kom aftur til familjuna, varð hon umskorin. Og síðani hava sálarlig hjáárin fylgt henni. Kate hevur búð í Danmark síðani 1978, og her greiðir hon frá søgu sínari, eins og hugt verður eftir óvanligum upptøkum av umskeringsritualinum.




SvF • Sunnudagin kl. 20.00

## Gamli postbáturin

Tá ferjulegan á Syðradali varð tikin í brúk á vári 2005, varð 75 ára gamli postbáturin skiftur út við bilferjuna Sam.
Barsskor hevur røkt hesa sigling bæði í góðum og ringum veðri í meira enn ein mansaldur. Nógv eru minnini hjá kalsoyingum um gamla postbátin. Farið verður ein túr við Barsskor fyri at vísa, hvussu tað var, áðrenn vegir og tunnlar komu í Kallsoynni.

**FRÍGGJADAGUR 23. MARS 2007**

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**